# Beckham hevur keypt seg leysan

Kaliforniska blaðið, Los Angeles Times, skrivar, at David Beckham hevur keypt seg leysan av sínum sáttmála við LA Galaxy, so hann kann spæla við AC Milan restina av kappingarárinum. Við at gjalda 40 milliónir krónur úr egnum lumma, hevur Beckham fingið í lag eina avtalu, sum letur hann spæla fyri Milan fram til 1. juni. Ein mánað seinni fer hann so aftur til USA fyri at gera kappingarárið liðugt í LA Galaxy, og tá sáttmáli hansara har gongur út í november mánaði, stendur honum frítt at skifta fótbóltsfelag.



# Eysturríki fær nýggjan venjara

Dietmar Constantini er nýggjur venjari hjá eysturríkska fótbóltslandsliðnum. Hann er 53 ára gamal og hevur áður vant feløg sum Austria Wien, Tirol og Mainz, umframt at hann eitt stutt skifti í 90-unum royndi seg sum eysturríkskur landsliðsvenjari. Hann tekur við starvinum eftir tjekkiska Karel Brückner, sum fyrr í vikuni legði frá sær, tí úrslitini – eitt nú javnleikur ímóti Føroyum – ikki hava verið nøktandi. Andreas Herzog, sum var hjálparvenjari hjá Brückner, skal nú venja eysturríkska U21-landsliðið.



*Hollendski málverjin hjá Manchester United, van der Sar, hevur júst slept bóltinum fyri føturnar á danskaranum hjá Newcastle, Peter Løvenkrands, sum mestsum bilsin fegnast um leiðslumálið*

# United sjey stig á odda

**Eftir dystirnar í bestu ensku deildini í gjárkvøldið og fyrrakvøldið er Manchester United framvegis klárt oddaliðið, hóast bæði Chelsea, Liverpool og Arsenal vunnu sínar dystir, meðan Aston Villa snávaði**

PREMIER LEAGUE
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Manchester United er nú aftur sjey stig framman fyri Chelsea og Liverpool, eftir at dystir eru spælir bæði í gjárkvøldið og fyrrakvøldið. United hevur enntá spælt ein dyst færri enn nærmastu kappingarneytarnir.

Manchester United vann 2-1 á Newcastle á St. James Park í Newcastle. Danski Peter Løvenkrands legði The Toon Army á odda, tá níggju minuttir vóru spældir, eftir at van der Sar gjørdi ein brølara, men longu 10 minuttir seinni javnaði Wayne Rooney til 1-1. Tíðliga í seinna hálvleiki gjørdist Dimitar Berbatov matchvinnari, tá hann skoraði til 2-1 til Manchester United.

Aston Villa misti tvey týdningarmikil stig í kappingini um at enda millum fýra tey ovastu liðini í Premier League. Aston Villa tapti 0-2 ímóti Manchester City á útivølli.

Á White Hart Lane var frøin stór, tá Robbie Keane legði Tottenham á odda 1-0 ímóti Middlesbrough. Bæði Keane og Spurs høvdu hart brúk fyri tí málinum, og var endin, at Tottenham vann heili 4-0.

### Tey næstu vunnu

Chelsea heldur góða formin undir nýggja venjaranum, Guus Hiddink. Suðuri í Portsmouth í fyrrakvøldið tryggjaði Didier Drogba enn eina ferð London-liðnum øll trý stigini. Sigursmálið fall, tá 11 minuttir vóru eftir av vanligu leiktíðini.

Liverpool kom á slóðina aftur, og kom tað óivað serliga væl við hjá venjaranum, Rafael Benitez, sum hevur kent eitt stórt trýst á sær síðstu vikurnar. Liverpool vann 2-0 á Sunderland. David N'Gog setti Liverpool á sigurskós, tíðliga í seinna hálvleiki, og løtu seinni staðfesti Yossi Benayoun sigurin.

Danski framherjin hjá Arsenal, Nicklas Bendtner, hevur verið ein tann mest útskeldaði fótbóltsspælarin í Onglandi síðstu vikurnar. Bendtner hevur brent illa, men í fyrrakvøldið var danska kanónin innstillað, tí hann skoraði tvey mál í 3-1 sigrinum hjá Arsenal ímóti West Bromwich á The Hawthorns-leikvøllinum í Birmingham.

## Úrslit og støða í Premier League

**Blackburn-Everton 0-0**

**Fulham-Hull 0-1 (0-0)**
0-1 Manucho, 90.

**Manchester City-Aston Villa 2-0 (1-0)**
1-0 Elano, 24.
2-0 Shaun Wright Phillips, 89.

**Newcastle-Manchester United 1-2 (1-1)**
1-0 Peter Løvenkrands, 9.
1-1 Wayne Rooney, 20.
1-2 Dimitar Berbatov, 56.

**Tottenham-Middlesbrough 4-0 (3-0)**
1-0 Robbie Keane, 9.
2-0 Roman Pavlyochenko, 14.
3-0 Aaron Lennon, 40.
4-0 Aaron Lennon, 79.

**Wigan-West Ham 0-1 (0-1)**
0-1 Carlton Cole, 34.

**Stoke-Bolton 2-0 (1-0)**
1-0 James Beattie, 14.
2-0 Ricardo Fuller, 73.

**Portsmouth-Chelsea 0-1 (0-0)**
0-1 Didier Drogba, 79.

**West Bromwich-Arsenal 1-3 (1-3)**
0-1 Nicklas Bendtner, 4.
1-1 Chris Bunt, 7.
1-2 Kolo Toure, 38.
1-3 Nicklas Bendtner, 44.

**Liverpool-Portsmouth 2-0 (0-0)**
1-0 David N'Gog, 52.
2-0 Yossi Benayoun, 65.

**Premier League**

| | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Man Utd | 27 | 20 - 5 - 2 | 48 | 12 | 36 | 65 |
| 2 Chelsea | 28 | 17 - 7 - 4 | 48 | 16 | 32 | 58 |
| 3 Liverpool | 28 | 16 - 10 - 2 | 45 | 20 | 25 | 58 |
| 4 Aston Villa | 28 | 15 - 7 - 6 | 42 | 29 | 13 | 52 |
| 5 Arsenal | 28 | 13 - 10 - 5 | 41 | 26 | 15 | 49 |
| 6 Everton | 28 | 12 - 9 - 7 | 36 | 28 | 8 | 45 |
| 7 West Ham | 28 | 11 - 6 - 11 | 34 | 34 | 0 | 39 |
| 8 Man City | 28 | 10 - 5 - 13 | 45 | 36 | 9 | 35 |
| 9 Wigan | 28 | 9 - 8 - 11 | 27 | 27 | 0 | 35 |
| 10 Fulham | 27 | 8 - 10 - 9 | 24 | 23 | 1 | 34 |
| 11 Bolton | 28 | 10 - 3 - 15 | 30 | 40 | -10 | 33 |
| 12 Hull | 28 | 8 - 8 - 12 | 34 | 50 | -16 | 32 |
| 13 Tottenham | 27 | 8 - 7 - 12 | 32 | 32 | 0 | 31 |
| 14 Sunderland | 27 | 8 - 7 - 12 | 27 | 35 | -8 | 31 |
| 15 Stoke | 28 | 7 - 8 - 13 | 27 | 44 | -17 | 29 |
| 16 Newcastle | 28 | 6 - 10 - 12 | 34 | 45 | -11 | 28 |
| 17 Portsmouth | 27 | 7 - 7 - 13 | 29 | 44 | -15 | 28 |
| 18 Blackburn | 27 | 6 - 9 - 12 | 30 | 43 | -13 | 27 |
| 19 Middlesbr. | 28 | 6 - 8 - 14 | 20 | 40 | -20 | 26 |
| 20 WBA | 28 | 6 - 4 - 18 | 25 | 54 | -29 | 22 |

# Sær lættari út í sjónvarpinum

**Russiski framherjin hjá Arsenal, Andrei Arshavin, er eftir ein mánað í enska felagnum komin til ta niðurstøðu, at fótbólturin í Premier League sær lættari út í sjónvarpinum, enn hann er í veruleikanum**

PREMIER LEAGUE
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Undir EM-endaspælinum í summar hugtók Andrei Arshavin sjónvarpshyggjarar um alt Europa við sínum spæli, og tí var ikki løgið, at fleiri feløg fóru at sýna honum áhuga. Tað gjørdist Arsenal, ið vann ta kapprenningina, so Arshavin í vetrarsteðginum skifti frá Zenit St. Petersborg til Arsenal.

Nú hann so hevur verið í London og enskum fótbólti í ein mánað, er hann komin eftir, at tað er ikki so lætt at gera vart við seg á ensku vallunum, sum hann helt frammanundan.

Higartil hevur hann verið á vøllinum fyri Arsenal í trimum dystum á rað, men enn er ikki eydnast honum at skora nakað mál fyri sítt nýggja felag, hóast hann í smáum løtum – og framvegis eitt fitt petti frá sínum frægasta formi – hevur víst, hvat hann dugir við bóltinum.

– Eg vildi helst fingið eitt mál sum skjótast. Øll væntaðu av mær, at eg skuldi skora í mínum fyrsta dysti, men tað geri eg ongantíð. Og her hevur einki víst seg at verið lætt og einfalt, so eg má bara brynja meg við toli og gera ein harðan innsats, sigur Andrei Arshavin.

Í fyrrakvøldið eydnaðist honum at leggja upp til eitt mál í útidystinum hjá Arsenal ímóti West Ham, og tað var eftir henda dystin, at hann yvir fyri heimasíðuni hjá London-felagnum viðgekk, at enskur fótbóltur sær øðrvísi út í lenistólinum heima í stovuni:

– Heima í Russlandi hugdi eg nógv eftir enskum fótbólti í sjónvarpi, og skal eg siga sum er, sá tað rættiliga lætt og einfalt út. Men nú eg havi verið tríggjar ferðir í dysti, dugi eg at síggja, hvussu dynamiskur og harður enski fótbólturin er, sigur Arshavin.



*Andrei Arshavin hevur eftir ein mánað í Arsenal funnið útav, at enskur fótbóltur ikki er so lættur í veruleikanum, sum hann sær út til at vera í sjónvarpinum*